Frásøgn nevndarinnar fyri 2011 – KT-felagið

Á aðalfundinum í 2011 stóðu Bjarni Askham Bjarnason og Hallur Hjelm fyri vali. Bjarni stillaði uppaftur og var afturvaldir. Niels Christian Nolsøe varð valdur fyri Hallur Hjelm. Fridolin Bic var afturvaldur sum tiltakslimur. Í nevndini sótu harumframt Petur Mittún, Fróði Magnusen og Michael Thomsen.

Nevndin skipaði seg við Petur Mittún sum formanni og Fróða Magnussen sum næstformanni. Í sept. 2011 valdi nevndin vegna starvsskiftið hjá formanninum at umskipa seg við Bjarna sum formanni og Fróða sum næstformanni. Petur tók seg úr nevndini.

Nevndin hevur arbeitt við hesum málum í 2011

1. Ískoyti til frágreiðing frá KT felagnum
2. Alment innkeyp og útboð
3. Serskattaskipan
4. FO ráðið
5. Onnur smærri mál

ad 1. Ískoyti til frágreiðing frá KT felagnum
Uppundir valið í oktober almannakunngjørdi KT felagið ískoyti til frágreiðingina "KT-keypsatburður millum almennar og privatar KT-keyparar" Í frágreiðingini hevur KT felagið seks ítøkilig tilmæli til landsstýrið um vøkstur og framburð í føroysku KT vinnuni.

Tilmæli 1: Fróskaparsetur Føroya skal taka lesandi til KT lesnað inn hvørt ár. Mælt verður til, at útbúgvingin verður víðkað til eisini at vera ein master-útbúgving.

Tilmæli 2: At ein ekspert-skipan verður sett í gildið í Føroyum, sum lokkar ekspertar til Føroya við skattalætta í avmarkaða tíð, eins og vit kenna tað úr øðrum Norðurlondum. Tað skal vera møguligt hjá KT-vinnuni at innflyta KT-frøðingar úr øllum heiminum uttan forðingar.

Tilmæli 3: At føroyskir KT-frøðingar, sum arbeiða uttanlands fyri føroyskar KT-fyritøkur, fáa ein serligan dagfrádrátt, meðan teir arbeiða uttanlands í longri tíðarskeið.

Tilmæli 4: At nýggjar føroyskar KT-skipanir sum meginregla vera bjóðaðar út.

Tilmæli 5: At tað almenna sum meginreglu brúkar føroyskar KT fyritøkur sum høvuðsveitarar til sínar uppgávur. Um ein útlendsk fyritøka fær eina almenna KT uppgávu, eigur tað almenna at seta sum meginreglu, at føroyskir undirveitar vera brúktir, fyri at tryggja, at vitan verður uppbygd í føroysku KT-vinnuni.

Tilmæli 6: At tættari samstarv verður millum stórar KS-keyparar, Setrið og KST vinnuna við tí í hyggju at fáa skapt tyssuførleika.

Hetta eru mál, sum felagið eigur at arbeiða víðari við í 2012.

Ad 2. Alment innkeyp og útboð
Landsstýrið hevur arbeitt við almennum útboðs- og innkeypsreglum í 2010 og 2011. KT felagið hevur fingið framløgu frá arbeiðsbólki, sum arbeiddi við hesum og hevur lagt fram síni sjónarmið um hetta. KT felagið gjørdi hoyringsskriv á vári 2011 til Vinnumálaráðið um ætlaða útboðspolitikin. Enn er ongin útbóðspolitikkur komin og í samgonguskjalinum er fráboðað, at ein ynskir at gera eina lóg um útboð og ein útboðportal.

Ad 3. Serskattaskipan
KT felagið sendi í tann 20. juni 2011 eitt tíðindaskriv um tey skattligu viðurskiftini í Føroyum. KT

felagið heitti á myndugleikarnar um at fáa sett íverk eina serskattaskipan. Boðskapur felagsins var at arbeiðsgevarar hava torført við at fáa fólk at arbeiða eyka vegna føroyska marginalskattin. KT Felagið hevur áður vístá, at torført er at fáa (KT) serfrøðingar til landi at arbeiða í føroyskum fyritøkum. Harafturat er tað trupult at fáa verandi starvsfólk at arbeiða meira við at bjóða løn sum samsýning. Orsøkin er einføld: Motivið hjá dugnaligum starvsfólkum er at vinna pening – ikki at rinda skatt. Danmark innførdi longu í 1991 serskattaviðurskifti fyri útlendskar serfrøðingar v.m., tí hesir í stóran mun fóru til onnur lond at arbeiða har lønin var hægri og skatturin lægri. Endamálið var at økja um arbeiðsútboðið, framleidni, kappingarførleikan samstundis sum skattainntøkur landsins øktust. Hetta verður gjørt við at bjóða serfrøðingum serliga "attraktiv" skattlig viðurskifti (26% av bruttoinntøkuni), um tey búseta seg og arbeiða í Danmark. Flestu grannalond okkara (t.d. Svøriki, Norra, Danmark, Finnland) hava fyri langari tíð síðani sæð týdningin av at hava eggjandi serskattaskipanir fyri serfrøðingar. KT Felagið heitti á Landsstýrið um at taka hesi álvarsmál upp til viðgerð í næstum.

Ad 4. FO ráðið
Sambært viðtøkum FO ráðsins er tað KT felagið, sum skal tilmæla allar limir tess. Tilmælið verður latið Vinnumálaráðnum sum formliga útnevnir limirnar. Í november hevur KT felagið tilmælt nýggjar nevndarlimir til FO ráðið. Nevndarlimirnir í FO ráðnum hava sitið longri enn viðtøkurnar áseta. Umframt hetta, ynsktu tveir limir at siga nevndarsessin frá sær. Limirnir í FO ráðnum eru nú Ísak Jacobsen, Óli Simonsen, Barbara Vang og Henny í Líknargøtu.

Ad. 5. Annað
Talgildar undirskriftir
Umboð fyri tað almenna og peningastovnarnir hava kunna KT felagið um arbeiði sum fer fram í sambandi við talgilda undirskrift. Talan er um eitt samstarv millum peningastovnarnar og landi, og fáa hesir partar eitt tilboð frá NETS í næstum.
KT felagið fegnast um, at tað nú er vorið meira ítøkiligt, og tað eru ávís sannlíkindi fyri at ein talgild undirskrift verður implementera innan alt ov langa tíð.

Grannskoðan
Á aðalfundinum var Spekt valt sum nýggjur grannskoðari hjá KT felagnum. Hetta kemst av at Vinnuhúsið hevur bjóðað grannskoðan út hjá øllum feløgum undir einum og Spekt hevði besta tilboðið.

Yvirskriftir í 2012
1. Umboðan vegna limir felagsins mótvegis almennum myndugleikum
2. Ekspertskattaskipan
3. Talgildar undirskriftir
4. Útbúgvingar
5. Útboðspolitikkur